# Fólkaflokkurin og tey kristnu og tey samkyndu

JÁKUP Á STONGUM
Fo-380 Sørvág



Í enn eini roynd at sleppa undan at taka støðu til ítøkiliga málið, skýtur flokkurin upp at broyta diskriminatiónslógina soleiðis, at onki stendur um: - race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse eller tro - tí so nýtast vit heldur ikki at seta »kynsligan samleika« í lógina, og so er hon galdandi fyri øll!!! Og politiið kann handla sum tað vil? Makan til kosmetiskt vrøvl!

Tað gevur onga meining at blanda religión og politik saman í einum landi, sum hevur trúarfrælsi, málið er jú ikki at skapa himmiríki á jørð, men við lógum og reglum at skapa frið millum okkum fjøltáttaðu menniskju.

Skammið tykkum, tit kristnu sum sláa bíbliuna í høvdið á minnilutum.

# Samkynd

JENS GUÐ
Íslandi



Eg eri ikki samkyndur. Men tað er eisini líka mikið. Tað er líka mikið hvønn kynsligan samleika hvør hevur, av tí at tað ger hvørki mær ella tær nakran skaða. Men fyri at verða erligur: Tá eg síggji eina vakra kvinnu á aldur við meg og eg fáði at vita at hon er samkynd, so hugsi eg stutt við mær sjálvum: "Tað var lort, eg hevði ynskt at hon kundi verið mín unnusta". Men so komi eg aftur til veruleikan og minnist at tað eru milliónir av vøkrum hetrosexuellum kvinnum til allastaðni í verðini. Gott nokk hava fleiri av teimum hava longu ein sjeik. Og um nakrar teirra hava eina damu ístaðin fyri ein sjeik, so kemur tað mær ikki við. Tað havi eg onki ímóti. There's plenty of fish in the sea!

Tá eg var tannáringur í byrjanini av sjeytiárinum gekk eg á tí íslendska universitetinum fyri list, har eg lærdi grafiskt design. Við vóru ikki nógv sum gingu í mínum klassa. Ein av mínum klassa kammeratum var homosexuellur. Hann var um tað mundi ein av teimum heilt fáðu samkyndu dreinginum í íslandi, ið ikki royndi at goyma sín sexuallitet.

Ein annars klassa kammeratur, ið var um sama aldur, bar stórt hatur ímóti tí homosexuella dreinginum. Einaferð stílaði hann fyri einum fundi, fyri øllum dreinginum í okkara klassa, uttan tí samkynda dreinginum. Hann segði: "Vit muga finna útav hvussu vit gera fyri at sparka hettar helvitis homosexuella svíni út úr skúlanum. Vit muga syrgja fyri at grafiskt design ikki endar við at merkja tað sama sum homosexuelt design! Tað kann skapa eina sera negativa ávirkan á okkara virksemi."

Síðan spurdi ein: "Hvør er ætlanin?". Tann homofobiski drongurin segði: "Tá tað verður dansur í komandi vikuskifti banka vit bara hendan fýrin av. Vit skulla banka hann so illa at hann ikki ivast í, at vit meina tað í álvara!"

Síðan segði eg: "Eg síggji ikki nakra grund fyri at vit skula geva honum bank. Summar av gentunum í okkara klassa síggja sera gott út. Hann roynir jú ikki eftir teimum. Tað merkir at tað eru størri sannlíkindi fyri at vit kunna fáa tær. Og tá eg einaferð byrji at arbeiða á einum ella ørðum lýsingarvirki fari eg óiva aftur at arbeiða saman við nøkrum øðrum vøkrum gentum. Teimum fer hann heldur ikki at royna eftir. Eg hevði ynskt at tað vóru fleiri homosexuellir dreingir í okkara klassa, og eg hevði ynskt at allir tit sum eru hetrosexuellir kláraðu tykkum so illa í skúlanum, at tit vóru noyddir at halda uppat."

Dreingirnir fataðu tað, ið eg royndi at siga teimum, og seinni flentu vit ofta at tí. Men øll tey fýra árini vit gingu í klassanum var tann homofobiski drongurin sera óndur ímóti í homosexuella dreinginum. Tað var irriterandi, ferð eftir ferð, at skula hoyra hann tosa um hvussu nógv hann ynskti at geva tí homosexuella dreinginum eina helvitis bank. Hann var í øðini.

Men einaferð var hann glaður. Hann hevði verið í einum dansi har hann hevði hitt ein annan homosexuellan drong, sum hann hevði sligið niður so hart, at drongurin misti vitið. Hann var errin av tí. Eg tók synd í teimum báðum.

Árini gingu. Tað íslendska samfelagið broytti seg frá at verða eitt snævurskygt samfelag, til at verða eitt opið og liberalt samfelag. Ísland er í dag eitt av teimum samfeløgunum í heiminum, ið er mest vinarligt mótvegis samkyndum. Tá okkara árliga "Gay Pride" skrúðgonga tekur stað, marsjera ímillum 30.000 til 40.000 fólk, fyri at stuðla frælsi og rættindum teirra samkyndu. Í dag er tað ongin trupuleiki hjá samkyndum íslendingum at verða samkyndir alment. Alt illavorið propaganda mótvegis samkyndum er fánað burtur í onki!

So ein dagin fann eg útav at mín gamli klassa kammeratur, tann sum var so homofobiskur, nú var staðin fram sum samkyndur alment. Hettar var mær eitt stórt yvirraskilsi at byrja við. Men nú havi eg lært, at hettar er júst ein av trupuleikunum, ið standast av einum homofobiskum samfelagið: Tey einastu fólkini, ið vilja banka homosexuellar dreingir, eru teir sum sjálvir eru homosexuellir! Teir eru illir tí at teir eru ikki sjálvir tilreiðar at liva opið sum samkyndir. Tað er tann einasta orsøkin til at teir vilja banka aðar homosexuellar dreingir. Vit sum ikki hava nakran hug at okkara egna kynið, hava ongar trupuleikar við at summi eru samkynd.

Orsøkin til at eg skrivi hettar kemst av tíðindunum um, at tit í Føroyum nú hava við tann sama trupuleikan at gera, sum vit í Íslandi høvdu at gera við fyri 30 árum síðan. Ein av tykkara bestu tónleikarum, Rasmus Rasmussen, tann frálíki gittarleikarin í Makrel, stríðist við homofobiskar samkyndar menn, sum enn goyma seg í skápinum.

Tað er stórur munur á teimum sum ikki dáma samkynd, og teimum sum leggja á samkynd! Hugburðurin og orsøkirnar hjá hesum báðum bólkunum av fólki eru sera ólíkar, tá tað snýr seg um samkynd.

# Man klatrar ikki í skápum...

ANNFINN DANIELSEN

Nú ein dagin var ein drongur so óheppin at klatra í einum skápi. Hann fór eftir einum bólti, sum lá á einum óhøgligum stað fyri henda 5 ára gamla. Ístaðin fyri at biða eitt av starvsfólkunum koma at hjálpa sær við at taka henda góða bóltin. Sjálvandi bóltar skápi, og drongurin, ólukkudýrið, liggur undir. Hann fær blátt eyga, men man fær eisini ilt, um eitt skáp koppar á ein. Tíbetur hendi tað ikki meiri enn tað.

Hvat við at lært børnini, at ein klatrar ikki í skápum?? Skal nú hvør Marsanna og Palleba at negla sær møblarnar fastar, bara tí at tað gera tey á dagstovnunum? Tað má so verða avleiðingin av hesum. Hvat við at lært børnini at verða tilvitað um, hvussu ein umgangur møblar?

Vit lærdu í øllum førum at umganga teir stóru møblarnar við varðsemi. Ja, ein slapp ikki inn í fínustovu, tí har kom man bara sunnudagar og til høgtíðirnar. Seinni vóru foreldur at yngru børnum so skilagóð, at tey keyptu møblarnar, so tey hóskaði til børnini. Tá kundi møblarnir fáa toyggið. Alt gott um tað, tí børn eru nú einaferð børn, og vóru tey ov væsut, so vóru tey biðin um at spæla uttandura.

Nei, álvaratos. Stór skáp, og at leggja ein bólt ovast í skápið. Tað kann ikki verða rætt. Men at fara at negla hvørt skáp og hvørja hyll. Er tað ikki ov langt úti? Tá haldi eg, at tað naturligasta var, at lært børnini at klatra í møblunum, tað ger man ikki, men heldur biðja um hjálp, tá ein hevur brúk fyri tí. Hví skal leikutoy altíð liggja so høgt? Er tað tí, at børnini ikki skulu spæla við tað?

Ein avleiðing av hesum má verða, at børnini, tá tey koma heim, fara at klatra ella enn verri, at ganga uppi undir loftinum, ja, tí tað kunnu tey í barnagarðinum. Onkur vil siga, at tað er mennandi fyri børnini... Stakkals pedagogar, og neyðars Marsanna og Palliba...

Vit kunnu verja børnini móti mongum, men er hetta ikki at gera ov nógv av?? ella skulu rammurnar verða so rúmar, at vit skulu kunna lata børnini klatra allastaðni. Tað hava nøkur av teimum brúk fyri.

# Heðin D. Poulsen fer skeivur

JASPUR VANG
Tvøroyri



**Tað gleðir meg av sonnum, at nú 4 mánaðar gamla grein mín framvegis spøkir í hugaheimi tínum góði Heðin.**

Í grein í Sosialinum 2. oktober 2006 fegnast tú um, at meiriluti ikki tykist vera í samgonguni fyri at leggja upp til dagføringar av ríksiveitingini. Eisini vísir tú til lesararabræv títt í bløðunum fyrst í juni mánaði 2006, har tú greitt gav til kennar, at tú ert ímóti einari dagføring av ríkisveitingini, tí tú óttast, at meirinntøkur, sum kundu verið fingnar til vega við einari slíkari dagføring, fara at verða verða nýttar til at betra um korini hjá okkara eldru og til at gera íløgur í - og ábøtur á vegir og berghol kring um í landinum. Skil slíka hugsan, hvør ið vil.

Samstundis vísir tú í lesarabrævinum 2. oktober 2006 til grein mína í bløðunum tann 19. juni 2006, har eg m. a. vísti á ta sannroynd, at fullveldisflokkarnir, við ikki at taka undir við einari dagføring av ríkisveitingini, framhaldandi avmarka inntøkur landskassans og harvið raðfesta fullveldi hægri enn vælferðina hjá vanliga føroyinginum. Eg skilji teg væl Heðin, at tað kennist svárt, hvørja ferð víst verður á, at ekstremistiski loysingarvongurin í flokki tínum, saman við fullveldisflokkunum, í ábyrgdarloysi var við til at skerja ríkisveitingina so ógvusliga, at landsbúskapurin higartil hevur mist uml. 2 milliardir krónur. Flestu føroyingar munnu vera samdir um, at sjálvt um lands-búskapurin í løtuni hevur viðrák, høvdu tvær milliardir krónur munað væl hjá eitt nú heilsuverkinum, skúlaverkinum, til íløgur í undirstøðukervið kring landið, á eldraøkinum ella hjá okkara pensionistum, hvørs inntøkur liggja millum 20 og 40% lægri enn pensiónirnar í teimum framkomnu londunum, vit vanliga ynskja at samanbera okkum við.

Í lesarabrævi tínum fegnast tú eisini um - og vísir á, at landsstýrið ikki hevur tikið inntøkur frá einari møguligari dagføring av ríkisveitingini við í nú fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri 2007. Til tað er bert at siga, at av tí at samráðingar enn ikki hava verið millum landsstýrið og stjórnina um møguliga dagføring av ríkisveitingini, eins og samgonguflokkarnir ikki eru samdir í málinum, ber ikki til at leggja fíggjarætlan við inntøkum, sum ikki eru til. Slík fiktiv inntøkuføring hevði sjálvsagt verið ábyrgdarleys.

Tá Heðin at enda í lesararbrævi sínum sigur Sambandsflokkin standa einsamallan við sjónarmiðinum um, at vit eiga at dagføra ríkisveitingina, ivist eg onga løtu í, at hann fer skeivur. Eg eri sannførdur um, at vit eru mong, serstakliga úr Sambandsflokkinum, meira hóvliga vonginum í Fólkaflokkinum og í Javnaðarflokkinum, sum veruliga ynskja at betra um korini hjá okkara pensionistum, dagføra og útbyggja vegakervið kring um í landinum og at veita m. a. heilsuverkinum og skúlaverkinum betur sømdir, heldur enn at skerja inntøkumøguleikar landskassans enn meira.


